# Sportís til Føroya við merkjavørum

**– Vit hava ein hóp av vørum, sum vit halda, at føroyingar kunnu hava áhuga fyri, og vit síggja við spenningi fram til vitjanina í Føroyum, sigur forstjórin í Sportís í Íslandi, Skúli J. Bjørnsson**

ÍSLENDSKT ÁTAK

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyritøkan, Sportís ltd., telist millum fremstu innflytarar og útbjóðarar av merkjavørum innan ítrótt og útgerð í Íslandi. Vørurnar, sum felagið umboðar – og vørurnar sum felagið sjálvt framleiðir, eru at fáa í mongum handlum, sum selja klædnavørur og ítróttarklæði í Íslandi.

Umframt at umboða ein hóp av útlendskum merkjavørur, framleiðir Sportís eisini Cintamani-klæði, bæði til uttanduranýtslu og ítróttarklæði.

Felagið selir eisini breytir til vatnskreiðing, fimleikaútbúnað til hallir og klintriveggir.

## Við frá byrjan

Sportís byrjaði sítt virksemi í 1983, og Skúli J. Bjørnsson, forstjóri í felagnum, hevur verið við frá fyrsta degi.

Hann sigur við Sosialin, at málið hjá fyritøkuni, nú vinnuligt íslendskt átak verður í Føroyum, er at leggja lunnar undir framtíðar samband við føroyskt felag, sum kann umboða vørurnar hjá Sportís í Føroyum.

– Vit hava ein hóp av vørum, sum vit halda, at føroyingar kunnu hava áhuga fyri, og vit síggja við spenningi fram til vitjanina í Føroyum.

## Sera gott átak

Forstjórin hevur sjálvur verið í Føroyum tvær ferðir áður, men tað eru longu fleiri ár síðan seinast.

– Eg var hugtikin av samfelagnum, og nú skipað verður fyri hesum átaki, haldi eg, at hetta er eitt sera gott tiltak, sum vónandi kann vera gevandi báðar vegir millum londini.

Hann sigur, at Sportís fegið vil hava ein distributør – ella útbýtara, í Føroyum, og tað verður hetta, sum felagið í fyrsta lagi fer at stevna fram ímóti.

Saman við Skúla á Føroyaferðini verður eisini kona hansara.

Á fyritøkuni hjá honum í Íslandi starvast tilsamans 12 fólk.





*Vørur frá Sportís*

## 40 milliónir

Skúli J. Bjørnsson sigur, at fyritøkan, Sportís ltd., sum er ein kend fyritøka í Íslandi, er vaksin rættiliga nógv seinastu árini og hevur í løtuni ein umsetning upp á einar 40 mió krónur um árið.

Í virkislýsingini av fyritøkuni verður sagt, at felagið hevur uttanduraklæði og ítróttarklæði av merkinum Cintamani í Føroyum, men ongan innflutning úr Føroyum.

